## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Týsdagur**
Andøvsgul til strúkur í vindi og vindur av útsynningi. Skýggjað og regn. Seinni stívt andøvsgul til hvassan vind av útsynningi. Skiftandi skýrák og ælaveður. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Mikudagur**
Andøvsgul til hvassan vind av vesturi, sum lækkar eitt sindur. Skiftandi skýrák við ælaveðri. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Hósdagur**
Mest skýggjað veður, men turt og fleyr, umleið 5 stig. Um náttini frískar hann vindin av landsynningi.

**Fríggjadagin**
Stívt andøvsgul til hvassan vind av landsynningi og suðuri. Skýggjað verður og regn. Seinni stívt andøvsgul av vestri og ælaveður. Hitin umleið 9 stig.

# Vikublaðið og Petur & Petur flyta yvir við Strond

**Karmarnir í miðbýnum í Havn eru vorðnir ov trongir hjá reklamuvirkinum Petur & Petur, tí hevur virkið leigað bygningin Yviri við Strond har Fiskimálaráðið hevur húsast**



*Danskir serfrøðingar hava kannað húsini, og siga at eingin soppur er í teimum*

**REKLAMUVIRKSEMIÐ**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Bygningurin Yviri við Strond, ið Fiskimálaráðið hevur húsast í, hevur staðið til leigu í eina tíð, aftan á at Fiskimálaráðið flutti út vegna ringa inniluft.. Men nú er funnin til størsta part av bygninginum, sigur Finnbogi Arge úr P/F Meinhard Arge, ið eigur bygningin.

Illgruni var um, at soppur var orsøk til ringu inniluftina. Men eitt danskt serfrøðingalið hevur kannað húsini og er komið til tað niðurstøðu, at eingin soppur er í húsunum. Serfrøðingarnir komu harumframt við uppskotum um ábøtur, ið kundu bøta munandi um inniluftina. Hesar ábøturnar verða nú gjørdar.

Men í komandi árið verður aftur virksemi í húsunum. Tá Petur & Petur og Vikublaðið flyta inn. Karmarnir har hesar fyritøkur húsast eru vorðnir ov trongar, og hetta er beinleiðis orsøkin til at tær flyta, sigur Árni Arge stjóri við Sosialin.

Hann sigur, at hetta sjálvandi eisini gevur møguleika fyri, at tey kunnu vaksa um virksemið. Árni Arge keypti herfyri ein triðing av Reklamuvirkinum.

Reklamuvirkið Petur & Petur er marknaðarráðgevi fyri fyritøkur og stovnar og framleiða og umsita grafiskar uppgávur og prentlutir, umframt samskipa og seta upp messubásar og framsýningar. Felagið varð stovnað í 1999 og hevur í dag 12 fólk í starvi. Hartil egur virkið eisini Vikublaðið, sum rekur blaðvirksemið og ferðaskrivstovuna VikuTur.

P/F Meinhard Arge seldi bilasøluna her fyri, men valdi framhaldandið at hava bygningin Yviri við Strond. Felagið hevur síðan tá keypt hornastykkið við síðuna av bygninginum og stykkið aftan fyri bygningin. Ætlanin er at seta okkurt á stykkið, men enn er avgerð ikki endaliga tikin um, hvat talan verður um.

Enn er heldur ikki endaliga avgjørt hvat virksemi, P/F Meinhard Arge skal fáast við í framtíðini. Men tað kann hugsast, at felagið fer at húsast á ovastu hædd úti við Strond, sigur Finnbogi Arge, ið tó vísir á, at í løtuni er tørvurin á skrivstovu ikki so stórur, eftir sum hann er einasta starvsfólk hjá felagnum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -12 |
| Nuuk | -8 |
| Qaqortoq | -6 |
| Ammassalik | -9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 2 |
| Tromsø | -7 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -5 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -7 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -1 |
| Bukarest | -1 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 10 |
| Athen | 6 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 32s |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í dag**
Eitt látrýst, 980 hPa, í ein landnyrðing úr Íslandi fer í ein landsynning, og Føroyar liggja í ælaverðursøki. Eitt annað lágtrýst, 980 hPa, beint eystan fyri Kappan fer í ein landnyrðing, og eitt tilhoyrandi brúgvalag nærkast Føroyum í nátt.




**Í morgin**
Skiftandi skýrák við ælaveðri, og eitt andøvsgul av vestri, sum minkar til lot. Um kvøldið lækkara hann til útsynning og veksur, og út á náttin til stívt andøvsgul. Tað verður skýggjað veður og út á njáttini verður regn av vestri. Hitin alt samdøgrið millum 3 og 7 stigh

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/12 kl. 06⁰⁰– 19/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,5°
Minsti hiti máldur í des.: -10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 18/12 kl. 06⁰⁰– 19/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 50,6 mm



**Vika 50 – 17. des.**
Vinnaratøl: 19 - 24 - 27 - 31 - 32 - 33 - 36

Eykatøl: 16 - 17

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | 4.094.668,- kr. |
| 6 vinnarat.+ eykatal: | 71.938,- kr. |
| 6 vinnaratøl | 4.269,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 178,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 48,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 50 – 17. des.**
Jokaratal: 4 - 6 - 8 - 8 - 9 - 1 - 5

| | |
|---|---|
| Øll 7 røtt: | Eingin/0,- kr. |
| 6 aftastu røtt: | 225.710,- kr. |
| 5 aftastu røtt: | 23.785,- kr. |
| 4 aftastu røtt: | 2.072,- kr. |
| 3 aftastu røtt: | 237,- kr. |
| 2 aftastu røtt: | 49,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



## TIPS 13 úrslit
**Vika 50 – 17. des.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | West Ham - Newcastle | 2 |
| 2. | Fulham - Blackburn | 1 |
| 3. | Everton - Bolton | 2 |
| 4. | Wigan - Charlton | 1 |
| 5. | Portsmouth - West Bromwich | 1 |
| 6. | Manchester C - Birmingham | 1 |
| 7. | Millwall - Reading | 2 |
| 8. | Wolverhampton - Leeds | 1 |
| 9. | Burnley - Watford | 1 |
| 10. | Luton - Stoke | 2 |
| 11. | Plymouth - Crystal Palace | 1 |
| 12. | Norwich - Southampton | 1 |
| 13. | Sheffield W - Ipswich | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | 19.137,- kr. |
| 12 røtt: | 591,- kr. |
| 11 røtt: | 67,- kr. |
| 10 røtt: | 22,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

15. desember Fullmáni
21 desember Mánin longst frá jørðini
23. desember Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. Des | 09.23 | 21.44 | 08.23 | 20.44 | 08.38 | 20.59 | 11.23 | 23.44 | 00.00 | 12.23 | 07.38 | 19.59 | 06.38 | 18.59 | 09.38 | 21.59 | 10.38 | 22.59 | 09.08 | 21.29 | 10.23 | 22.44 |
| 20. Des | 10.06 | 22.26 | 09.06 | 21.26 | 09.21 | 21.41 | - | 12.06 | 00.44 | 13.06 | 08.21 | 20.41 | 07.21 | 19.41 | 10.21 | 22.41 | 11.21 | 23.41 | 09.51 | 22.11 | 11.06 | 23.26 |
| 21. Des | 10.47 | 23.05 | 09.47 | 22.05 | 10.02 | 22.20 | 00.26 | 12.47 | 01.26 | 13.47 | 09.02 | 21.20 | 08.02 | 20.20 | 11.02 | 23.20 | - | 12.02 | 10.32 | 22.50 | 11.47 | - |
| 22. Des | 11.23 | 23.53 | 10.23 | 22.53 | 10.38 | 23.08 | 01.05 | 13.23 | 02.05 | 14.23 | 09.38 | 22.08 | 08.38 | 21.08 | 11.38 | - | 00.20 | 12.38 | 11.08 | 23.38 | 00.05 | 12.23 |
| 23. Des | - | 12.24 | 11.24 | 23.55 | 11.39 | - | 01.53 | 14.24 | 02.53 | 15.24 | 10.39 | 23.10 | 09.39 | 22.10 | 00.08 | 12.39 | 01.08 | 13.39 | - | 12.09 | 00.53 | 13.24 |

5 707265 100029 >